# Smakkiroynd av oljuvinnu

**Oljuútbúgvingarsamtakið skipaði í døgunum 26. november til 3. desember 2001 fyri undirvísingarvitjan á Aberdeen College í samstarvi við ASET, har 16 næmingar frá teknsiku skúlunum í Havn og Klaksvík fingu eina smakkiroynd av oljuvinnuni.**

ÚTBÚGVING
*Jan Müller*

Tað vóru 16 nøgdir næmingar, sum tíðliga í desember mánaði komu heimaftur av væleydnaðari vitjan í Skotlandi, har teir høvdu verið gestir hjá Aberdeen College.

Vitjanin í Skotlandi kom í lag, eftir at eitt umboð fyri Aberdeen City Council á vitjan í Føroyum í fjør gjørdi avtalu við Oljuútbúgvingarsamtakið um at senda tíggju føroyskar næmingar til Aberdeen á útbúgvingarferð. Men áhugin var stórur á teknisku skúlunum, og tað vísti seg, at heili 16 næmingar høvdu hug at sleppa við. Endin var, at allir 16 sluppu.

### Luttóku í undirvísingini

Vitjanin var væl fyrireikað, og tíðin varð brúkt í æsir ta vikuna, næmingarnir høvdu í Aberdeen. Longu tíðliga morgunin eftir at næmingarnir vóru komnir framkomnir, byrjaði skúlagongdin á Aberdeen College.

Føroysku næmingarnir luttóku í undirvísingini saman við skotsku næmingunum. Fyrsta dagin vóru teir millum annað á instrumentdeildini, har undirvísingarhølini vóru innrættað sum dekkið á einum oljupalli. Saman við teimum skotsku næmingunum skuldu føroysku næmingarnir ganga runt í trygdarskóm, hjálmi, brillum og drakt og loysa ymsar eftirlitsuppgávur.

Seinni var millum annað el-arbeiði á skránni, og har fingu føroysku næmingarnar ein smakk av, hvat krevst av trygdartiltøkum umborð á einum boripalli, har eitt og hvørt elarbeiði á pallinum, krevur loyvi frá hægri myndugleika á pallinum.

– Um tað bert er at skifta eina sikring, skalt tú roknað við at hava 10 undirskriftir frá omanfyri standandi fólkum. Hesar eru reglurnar, og tær skulu fylgjast, skriva næmingarnir í frágreiðing síni frá túrinum.

### Innlit í oljuvinnuna

Ferðin hjá teimum 16 lærlingunum endaði við einari vitjan umborð á einum boripall, sum stendur uppi á landi. Hetta er ein veruligur boripallur, sum verður brúktur til at venja fólk upp til at arbeiða við boring. Fólk í uppvenjing sleppa at bora langt niður í jørðina, og tey venja arbeiðsgongdir, ið verða brúktar á veruligum pallum.

Hetta var ein stór uppliving fyri næmingarnar, tí boripallurin var fult útgjørdur við simolatorum eins og tungari útgerð.

Seinni sama dag vóru næmingarnir á vitjan hjá Amerada Hess, áðrenn leiðin hjá næmingunum gekk aftur til Føroya, eitt innlit í arbeiðsgongdir innan oljuvinnuna ríkari.

†

**ans ybo**

ættaður úr Hesti, búsitandi í Havn
andaðist á Landssjúkrahúsinum
sunnukvøldið 82 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni
hósdagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**orgar oul rni arita og nna ary**

## Tøkk

Nú Miðbergs Bakarí hevur skift eigarar, ynskja vit, Hallgrím og Elinborg, at takka viðskiftafólki og starvsfólkum okkara fyri eitt gott samstarv gjøgnum farnu ár.

Eisini takka vit fyri blómur, gávur og góð ynski.

Í hesum sambandi ynskja vit Sigbjørg og Sofus, Eyð og Rodmund góða eydnu og Harrans signing.


Bústevnan Hús & Innbúgv

3. , 4. og 5. mai verður Ítróttarhøllin í Runavík karmur um størstu messu nakrantíð innan føroyska byggimarknaðin og innbúgv.

Skalt tú byggja nýtt ella umvæla gamalt, so er vert at leggja leiðina framvið í Runavík og fáa allskyns hugskot og tilboð heim við til húsa aftur.

Allar førandi fyritøkur sum hava eitthvørt við føroyska byggimarknaðin ella innbúgv at gera, verða umboðarðar.

Opið er allar dagarnar frá kl. 10.00 - 20.00
Ókeypis atgongd.
Børn bert atgongd saman við vaksnum.



Høvuðsstuðul hjá Hús & Innbúgv
FØROYA SPARIKASSI

HÚS & INNBÚGV
Postbox 169 • FO-620 Runavík
Tel 44 91 91 /45 63 98 Fax 44 86 35
Fartel 22 29 82 / 26 15 44
Email nhj@post.olivant.fo








Heilin viknar, og tú fert at gloyma. Tað verður torført at orða teg, at gera vanligar uppgávur ella bara at vita, hvar tú ert. Soleiðis er at gerast dementur. Tilveran upploysist. Tú missir teg sjálvan burtur, og tíni kæru missa ein, tey eru góð við.

Eini 900 fólk í Føroyum eru rakt av demens. Ein triðingur av teimum eru ringir røktarsjúklingar við serligum tørvi. Sostatt hava eini 300 fólk átrokandi hjálp fyri neyðini. Í øllum Føroyum eru bert 25 røktarheimspláss sett av til hendan samfelagsbólk. Mong hava tí eitt óvirðiligt lív, har tey eru ein byrða hjá sínum avvarðandi, ið hava ilt við at fáa gerandisdagin at hanga saman.

Ringt er at gloyma, men tað er verri at vera gloymdur. Samfelagið hevur gloymt tey, sum eru vorðin minnisveik. Tíðin er komin at gera nakað, áðrenn byrðan verður ov tung at lyfta.

ALZHEIMER felagið

Demenslinjan tel. 31 31 02 er opin hvønn týsdag kl. 18 til 20.

www.alzheimer.fo